## Beskytteren sleipaður á Havnina

Stutt fyri døgurða í dag bleiv verjuskipið »Beskytteren « sleipað inn um molan í Havn av tveimum bátum hjá Tórshavnar Skipasmiðju. Tað veit Vikublad.fo at siga. Vikublaðið skilir, at »Beskytteren « hevði ein róðursskaða og tað var orsøkin til, at verjuskipið varð sleipað inn. Annar av bátunum hjá Skipasmiðjuni hevði ein enda, sum var settur fastur afturi í reyvuni á »Beskytteren «, meðan hin báturin setti á gronina hjá Beskytteren, sum sostatt kom bakkandi inn um molan.




## Fleiri á heysin í Danmark

2.386 ferðir mátti ein donsk fyritøka ásanna, at henni var ikki lív lagað. Hetta er ein hækking í mun til árið fyri. Tað skrivar Business-Line í morgun. Talið á húsagangum í donskum fyritøkum vaks við sløkum 20% í mun til 2006. Tilsamans vóru 396 fleri húsagangir í 2007 enn 2006. Tað er serliga í økinum kring danska høvuðsstaðin, at niðurtúrurin gjørdi enda á fleiri fyritøkum. Í Danmark sum heild fóru 2.386 fyritøkur á húsagang í fjør. Eisini í Norðurjútlandi hava húsagangirnir gjørt um seg og vóru 24% fleiri í 2007 í mun til 2006.

# Glaðir hóast allir partar tapa

**Higartil hevur Fiskimannafelagið noktað blankt at tosa um at fiskimenn skulu betala ein part av oljuútreiðslunum hjá skipunum, men tað hevur Fiskimannafelagið nú bundið seg til at gera eftir semjuni, sum varð gjørd leygarkvøldið, sigur formaðurin í Reiðarafelagnum**

SEMJA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Nú vil Fiskimannafelagið tosað um oljuútreiðslurnar til skipini og tað er eitt frambrot, sigur formaðurin í Reiðarafelagnum*

- Vit eru ómetaliga glaðir fyri, at skipini aftur sleppa at fiska. Men báðir partar hava tapt, tí tað er ongantíð nakar, sum vinnur í einum verkfalli.

Tað staðfestir Viberg Sørensen, formaður í Reiðarafelagnum, nú verkfallið hjá Fiskimannafelagnum endaði leygarkvøldið.

Kortini heldur hann, at báðir partar komu nøkunlunda heilskapaður burturúr verkfallinum og tær eykaútreiðslur, sum eru lagdar á reiðararnar í nýggja sáttmálanum, hava ikki nógv upp á seg í heildarmyndini, heldur hann.

- Tað er yvirkomiligt, sigur formaðurin í Reiðarafelagnum.

Hann fegnast serliga um, at verkfallið endaði nú, tí hann fryktaði fyri, at tað fór at vara í fleiri vikur afturat og tað hevði verið ein vanlukka fyri alt samfelagið.

- Fingu vit ikki enda á verkfallinum nú, hevði tað helst vart út í februar mánað, heldur hann.

### Skulu tosa um oljuna

Tað, sum serliga skilti partarnar, var tann umstrídda oljusemjan, sum varð gjørd í seinastu samráðing. Har stendur, at fer oljan upp um 2,90 krónur fyri liturin, skulu partarnir tosa saman um oljuútreiðslurnar. Tað, sum liggur í hesum er, at fiskimenninir skulu betala ein part av oljuni.

Men hetta noktaði Fiskimannafelagið blankt og tað er var ein høvuðsatvoldin til verkfallið.

- Fiskimannafelagið hevur higartil noktað blankt at tosa um oljuna, men í nýggja sáttmálanum stendur beinleiðis, at partarnir skulu taka spurningin um útreiðslurnar til oljuna upp av nýggjum longu í ár.

- Sostatt hevur Fiskimannafelagið beinleiðis givið tilsøgn um, at vit skulu tosa um oljuna og tað er eitt frambrot, sigur Viberg Sørensen.

- Nú hava vit eina avtalu um, hvat vit skulu gera við tær øktu oljuútreiðslurnar og tað eru vit væl nøgdir við, tí tað hevur Fiskimannafelagið ikki viljað hoyrt talan um higartil, leggur hann afturat.

### Endavenda sáttmálanum

Samstundis fegnast hann um, at partarnir eru samdir um at gjøgnumganga allan sáttmálan.

- Vit ætla at rudda borðið, tí sáttmálin er gamal og ótíðarhóskandi og tí er endamálið hjá Reiðarafelagnum at gera ein spildurnýggjan sáttmála og í tí sambandinum skulu vit eisini tosa um oljuna, eins og vit skulu umrøða øll onnur viðurskifti, sum hava við raksturin hjá skipunum at gera, sigur formaðurin í Reiðarafelagnum.

Hann ivast ikki í, at tað ber til at gera ein nýggjan sáttmála, sum eru til frama fyri báðar partar.

- Skipanin er stirvin og nógvar tillagingar kunnu gerast í sáttmálanum, sum koma báðum pørtum til góðar.

Tað kann gerast við rationaliseringum, eitt nú í manningartali.

- Eitt dømi er, at bæði við flakatrolarum og nótaskipum kunnu væl færri mans vera við, enn tað eru nú, sigur formaðurin Reiðarafelagnum.

- Nú vóna vit, at báðir partar fara undir hetta arbeiðið við opnum sinni fyri at fáa nakað gott burtur úr og fyri at lata upp fyri nøkrum møguleikum, sum ikki bera til nú.

**Meiri um hetta er á síðu 27.**

# Reiðarar gjalda fimm krónur meiri um dagin

**Í semjuni, sum leygarkvøldið gjørdi enda á verkfallinum hjá Fiskimannafelagnum, er eftirlønin hækkað og túralongdin stytt**

SEMJA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað vóru ikki stórar broytingar, sum vórðu gjørdar í nýggja sáttmálanum ímillum Reiðarafelagið og Fiskimannafelagið og leygarkvøldið gjørdi enda á verkfallinum.

Fiskimannafelagið fór í verkfall 19. desember, men fríggjadagin vórðu samráðingar tiknar upp aftur saman við semingsmonnunum og leygarkvøldið samdist partarnir um ein nýggjan sáttmála.

Nýggi sáttmálin er bara galdandi í eitt ár og hann fer úr gildi aftur tann 1. desember.

Eftir nýggja sáttmálanum skulu reiðararnir rinda fimm krónur meiri um dagin í eftirlønargjaldi til hvønn fiskimann.

Sostatt verður gjaldið hjá reiðarunum til eftirløn 35 krónur um dagin. Frammanundan hava fiskimenninir sjálvir rindað 22 krónur. Í framtíðini skulu teir eisini rinda 35 krónur soleiðis at gjaldið til eftirløn hereftir verður 35+35 krónur um dagin, ella 70 krónur tilsamans.

Spurningurin um eftirlønir var eitt av høvuðsmálunum hjá Fiskimannafelagnum.

Túralongdin hjá teimum á langfaraveiðu verður stytt úr trimum og niður í tveir og ein hálvan mánað.

Tað hevur ongantíð staðið í sáttmálanum, hvør skal rinda fyri ferðingina, tá ið manning verður skift í útlendskari havn. Nú er staðfest í sáttmálanum, at tað skulu reiðararnir gera, men hetta hava reiðararnir yvirhøvur goldið frammanundan.

### Betala ikki oljufyri fyrst

Tað, sum serliga skilti partarnar, var tann umstrídda oljusemjan, sum varð gjørd í seinastu samráðing.

Har stendur, at fer oljan upp um 2,90 krónur fyri liturin, skulu partarnir tosa saman um oljuútreiðslurnar.

Tað, sum liggur í hesum er, at fiskimenninir skulu betala ein part av oljuni.

Men hóast oljan nú kostar fýra krónur fyri kilo, hevur Fiskimannafelagið noktað blankt at tosa um at fiskimenn skulu betala og tað var ein høvuðsatvoldin til verkfallið.

Í nýggja sáttmálanum eru fiskimenninir slopnir undan at betala ein part av oljuni.

Í hvussu so er í fyrstu atløgu, tí í nýggja sáttmálanum stendur, at partarnir skulu taka spurningin um útreiðslurnar til oljuna upp av nýggjum longu í ár.

Í sáttmálanum stendur eisini, at partarnir í ár skal allur sáttmálin endurskoðast og nútímansgerast og har verður spurningurin um oljuútreiðslurnar ein partur av viðgerðini. Miðjað verður somuleiðis eftir, at endurskoðanin av sáttmálanum fer fram saman við hinum báðum manningarfeløgunum, Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelag Føroya.

Í hesum sambandi er ætlanin at manningarfeløgini og Reiðarafelagið seta ein arbeiðsbólk við umboðum úr øllum feløgunum at orðað eitt uppskot til nýggjan sáttmála, sum ætlandi skal fáa gildi 1. januar 2009.

Og hetta arbeiðið skal ganga skjótt, tí longu fyri 15. februar skulu partarnir velja síni umboð í bólkin og fyri 1. apríl skal bólkurin leggja arbeiðssetning og tíðarætlan fyri arbeiðið at gera nýggjan sáttmála fyri feløgini til góðkenningar.

Í sáttmálanum stendur eisini, at verður siglingartíðin útsett skal manningin hava boð um hetta skjótast gjørligt.

**Meiri um hetta er á síðu 27.**